## Tríggjar kappingar

Næmingarnir í flokkunum báðum vóru teir sum vunnu kappingina, sum varð hildin á Føroya Tele í november mánaði í fjør. Liðið kallaðu tey Junior Kids. Fyri henda heiðurin luttóku tey í eini tilsvarandi kapping í Danmark stutt eftir, og har gjørdust tey næstbest. Nú liggur leiðin til Atlanta í USA, har næmingarnir skulu kappast ímóti ungdómi úr øllum 80 londum í døgunum 17. til 19. apríl. Á heimasíðuni hjá Skála skúla – www.skulin.fo/ska - verður møguligt at fylgja við, hvussu gongst teimum í kappingini.



## Skála skúli um 10 ár

Hóast tey ikki verða næmingar í skúlanum um 10 ár, so hava næmingarnir kortini síni ynski fyri barnaskúla teirra. Í 2018 vóna tey, at skúlin hevur sólfangarar á takinum og eina vindmyllu uttanfyri, sum kann veita skúlanum streym og orku. Ein ketil skal gera sítt til, at børnini ikki sita køld í tímunum.

# so sigi eg Umhvørvi



*Næmingarnir í 6. og 7. flokki skulu ikki so langt fyri at finna tekin um dálking av náttúruni í heimbygdini. Hóast Skála Skipasmiðja útvega arbeiði til fólk í hópatali, er nógv dálking í kjalarvørrinum á hesum veruleika*



*Næmingarnir hava ídnir arbeitt seg fram við verkætlanini innan alternativa orku. Ein vindmylla, sólfangarar og ein vatnmylla eru úrslit av hesum*



*Nú fáa tey løn fyri stríðið: Fyrst vunnu tey føroysku kappingina, síðani gjørdust tey næstbest í teirri donsku og leygardagin gongur leiðin til USA*

ídnu og skilagóðu næmingarnir hava sett seg inn í:

Hitin frá sólini og teir sonevndu sólfangararnir, eru eitt annað viðkomandi evni.

- Ein kundi gott sett nógv fleiri sólfangarar upp á húsini. Hetta gevur streym og hevur einki CO2-útlát. Og so kostar tað einki at brúka tað.

- Eg haldi ikki, at tað sær so ljótt út at hava slíkt á húsunum. Eg ætli mær sjálv at fáa slíkt uppá míni hús, tá eg einaferð komi so langt, sigur ein av yngru gentunum í flokkinum.

Hini í flokkinum flenna eitt sindur, - ikki eftir hugskotinum, men meiri eftir tí, at henda gentan veruliga hevur skilt hvussu nógv tann einstaki kann gera fyri umhvørvið.

### Sólfangarar á klæðunum

Tað finnast longu slíkir sólfangarar í teirra nærumhvørvi, bæði á Skála og í Skálafirði. Men henda gentan sær eisini heilt aðrar møguleikar í sólfangarunum.

Hon greiðir hinum í flokkinum frá, at ein kundi til dømis havt slíkar sólfangarar uttan á jakkanum ella í keppinum. So kundi ein løtt eitt battarí upp við hesum, og brúkt tað í telduni ella onkra aðrastaðni.

- Tað snilda við tí er, at tá ein sær at battaríið er við at tømast, so má ein útum fyri at ganga sær ein túr.

- Á henda hátt ger ein brúk av alternativari orku, samstundis sum ein ger ein innsats fyri at fáa fríska luft, sigur henda sera skilagóða gentan í 6. flokki.

> *Fyri okkara skuld kundi ein bara fylt Lítlu Dímun við vindmyllum*

## Gera uppreistur á Skála

Vakra føroyska náttúran hevur eisini verið ein partur av arbeiðinum í hesi verkætlanini. Í teirra verð má alt gerast fyri at náttúran og umhvørvið vera varðveitt.

At tað ikki er so allastaðni, fáa tey besta dømið um úr heimbygdini, har skipasmiðjan eftir teirra tykki er ein umhvørvisbumba av rang.

Ein onnur slík bumba liggur ikki nógvar kilometrar frá teimum. Omanfyri Norðskála eru menn í ferð við enn eitt umfatandi arbeiði at útvega meiri vatn til Eiðisverkið.

Hóast roynt hevur verið at mótmælt, og undirskriftir verða savnaðar inn ímóti at vakrar áir hvørva og verða turrlagdar, er helst lítið sum bendir á, at alt hetta fer at fáa nakra ávirkan á arbeiðið.

Men varð ein líknandi ætlan løgd fram á Skála, høvdu næmingarnir í 6. og 7. flokki helst gingið frammarlaga í mótmælunum ímóti øllum ætlanum við so stórum avleiðingum fyri náttúruna og umhvørvið í heimbygdini.

- Tað hevði verið rættiliga rotið um allar áirnar her á Skála blivu burtur – og alt kanska hevði mint meiri um eina oyðimørk í okkara vøkru bygd, sigur ein næmingur.

Ein annar næmingur er skjótur at koma við síni viðmerking:

- Um nakar hevði torað at komið fram við einum slíkum hugskot her á Skála, so hevði tað heilt sikkurt blivið til uppreistur í bygdini. Og vit høvdu gingið á odda!, slær hann fast.

Við hesum er ávaringin givin víðari.

### FAKTA

**Næmingar í 6. og 7. flokki**
Teir 12 næmingarnir, ið hava verið við í kappingini eru hesir: Úr 6. flokki: Alex Djurhuus , Brynjard Olsen, Jana Joensen, Sólbjørg Jacobsen, Maria Joensen og Tóra Johannesen Úr 7. flokki: Sverri Jensen, Alex Joensen, Martin Didriksen, Jóhannus Kristmundsson